# Fulltrúar til Føroya Kærustovn

## Søkt verður eftir 2 fulltrúum til Føroya Kærustovn

**Vit eru skrivstova hjá**
- Kærunevndini í almanna- og heilsumálum
- Skatta- og avgjaldskærunevndini
- Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum
- Lendiskærunevndini
- Vinnukærunevndini og
- Skuldarumskipanarnevndini.

**Arbeiðið fevnir í høvuðsheitunum um**
- at lýsa og viðgera kærur frá borgarum og fyritøkum
- at gera nevndunum tilmæli um avgerð
- at hava samskifti við kærarar og stovnar innan kæruøkini
- at luttaka í gerð av ársfrágreiðingum, avgerðarsøvnum og vegleiðingum til stovnar og borgarar

**Vit bjóða**
- spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi og
- góðar skeið– og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Førleiki**
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum um størri arbeiðsuppgávur.
- vit vildu helst, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv, men hevur tú aðra samfelagsvísundaliga útbúgving frá hægri lærustovni, ert tú eisini vælkomin at søkja.
- lesandi, sum eru um at vera liðug við lesnaðin, eru eisini vælkomin at søkja.

**Løn- og setanartreytir**
verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Størvini verða at seta frá 1. desember ella eftir avtalu. Vit bíða fegin eftir tí rætta.

**Umsóknir**
Freistin at søkja er 12. november 2008. Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Føroya Kærustovnur
Sigmundargøta 13, 2. hædd – Boks 45
110 Tórshavn

Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við Anju Hovgaard, stjóra, á tlf. 320585 fyri at frætta nærri um starvið.

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Løgmálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Lendiskærunevndina og Vinnukærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipa narnevndini. Á stovninum starvast í løtuni 8 fólk, stjórin, tríggir løgfrøðingar og fýra skrivstovufólk.



# Leys størv í Tórshavnar kommunu

### Pedagogur til Frítíðarskúlan í Hornabø

Søkt verður eftir einum **pedagogi** at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 7. november 2008.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigrun Magnussen, stovnsleiðara, telefon 31 44 67 ella 21 44 67.

**Tórshavnar kommuna**

Lesið Sosialin -so eru tit við!